# ðingur í tara

kavi, t.d. havi eg funnið eitt nýtt taraslag á Trongisvágsfirði, so eg eri spent uppá, hvat víðari kanningar á fjørðinum kunnu vísa. Og Suðuroyggin hevur fleiri firðir, so eg komi ikki at sita hendur í favn, sigur Agnes. Men fremst í huganum stendur ein PhD ritger. Henni stendur í boði at koma til USA at granska í reyðtaraslektini "Porphyra", og júst grundkanningarætlanin við Porphyra er hjartabarnið hjá Agnes, hetta skrivaði hon eisini høvuðsuppgávu um. – Nógv Porphyra sløg finnast í Føroyum, og eftirsum tey eru sera trupul at slaggreina, tí tey líkjast so nógv, helt eg tað vera eitt spennandi og avbjóðandi evni. Í høvuðsuppgávuni býtti eg arbeiði í tríggjar partar, sum skuldu samanhaldast, fyri at fáa eina so neyva slaggreining sum tilbar: Hvussu sá slagið út (morfologiin), hvar vaks tað (vistfrøðin) og so tann genetiska dimensiónin (DNA-sekvensar). Og tað hepnaðist sera væl, sigur Agnes.

## Kunnu skapað eitt inspirerandi samfelag

- Eg haldi, at Føroyar eru eitt spennandi stað, har nógvar broytingar fara fram í løtuni. Um viljin er, kunnu vit skapað eitt inspirerandi samfelag, við stórari atdráttarmegi. Eg veit, at fólk aðrastaðni síggja land okkara sum nakað serligt, verði ofta spurd, um tað er gjørligt koma til Føroyar á skeið innan lívfrøði, og tá má eg svara nei, vit hava eitt universitet, men ongi international skeið at bjóða, tíanverri. At hugsa sær, um vit gjørdu eina havlívfrøðiliga feltstatión í Føroyum, har fólk komu uttanífrá, bæði sum lærarir og næmingar, at vinna sær vitan innan taralív og onnur havlívfrøðilig øki. Vit kundu skipað fyri feltskeiðum, sum í høvuðsheitinum ikki krevja annað enn mikroskop, bát, rennandi sjógv og umstøður at sova og eta. Hesi skeið kundu t.d. virka sum ein partur av Fróðskaparsetrinum. Eg havi júst verið á einum feltskeiði í Noregi, har tær fysisku rammurnar vóru ein lítil feltstatión við køki og kømurum, mikroskop og undirvísingarfacilitetir, ein bátur og so áhugaði og kompetent fólk. Høvuðsendamálið við hesum feltskeiði var at samla fólk, útveksla vitan, samla tara í náttúruni, slaggreina, skráseta og aftur skráseta, alt vit sóu. Skrásetingin er sera týdningarmikil, fyri at kunna staðfesta broytingarnar. Í Føroyum eru vit altíð so øgiliga skjót at tosa um kostnaðin av øllum fyri at fáa tingini á glið, eisini tá vit tosa um útbúgving og gransking. Og væl vitandi um, at alt kostar, so kunnu vit eisini skapa nakað, meðan vit bíða eftir teim stóru pengunum. Vit mugu byrja einastaðni, og at raðfesta útvekslan av vitan og menniskjum høgt, má vera av størsta týdningi fyri samfelagið. Vit eiga eina perlu av eini náttúru, vit áttu at verið meira opin, og útbúgvi onnur enn føroyingar her, tað hevði bara komið okkum til góðar. Nú veðurlagsbroytingarnar eru so ógvusligar, er sera týdningarmikið við skrásetingum, tí tað mangla vit í stóran mun. Vit liva av fiski, og tað er ongin ivi um, at hitabroytingar fara at ávirka fiskastovnarnir. Um norðuratlantshavspumpan viknar, verður kaldari um okkara leiðir. Vit eru so sárbar í hesum broytingartíðum. Tann gransking, sum fer fram, er sjálvandi, í høvuðsheitinum, innan fisk, men vit mugu eisini differentiera granskingina í framtíðini, eggja til gransking í mentan, máli o.s.fr. Útheimurin hevði eisini verið áhugaður í at fylgt kanningum her, tí vit eru ein rættuliga homogenur bólkur, har øll kunnu vera við í skrásetingunum, okkara data kunnu tí verða gull verd.

Tari er sera dekorativur. Her hevur Agnes nýtt tara, ístaðinfyri grann, til eina "jóladekoratión".



## Varin við ógvusligum broytingum

- Vit tosa nógv um undirsjóvartunlar og infrakervið, um pengar og prioriteringar. Áðrenn so stórar íløgur verða gjørdar, skuldu vit kanska sett spurnartekin við, hvønn menniskjaligan týdning tað hevur fyri okkum, at broyta struktúrin í samfelagnum so ógvusliga. Um alt okkara oyggjaland, sum úti í heimi er kosið at vera óspilt, skal bindast saman úr enda í annan, er tað ikki longur bara ein spurningur um milliardir. At eg t.d. velji at flyta aftur á Tvøroyri, og ikki til Havnar, snýr seg nógv um kenslur, ein serligan form fyri heimlongsul, sum er samantvunnin við mentanina, humorin, málið/dialektina, náttúruna o.s.fr. her suðuri. Hetta var ikki sermerkt fyri meg, øll míni føroysku vinfolk høvdu henda serliga longsulin, sum eg haldi er sermerktur fyri okkum føroyingar. Eg gloymi ikki fyrstu ferð eg hevði ein tvøramann sum undirvísara á Setrinum, tað var fantastiskt at hoyra um havlívfrøði á tvøramáli. Tí haldi eg, vit skulu vera væl fyrireikað, áðrenn vit gera so drastiskar broytingar í samfelagnum. Eg haldi, í hvussu er, at vit skulu vera eitt sindur varin við risastórum íløgum júst nú. Búskapurin er glóðheitur og kanningar vísa, at árið í ár er onki serligt fyri gróðurin í havinum, tað bremsar tilgongdini av fiski og harvið pengum, sigur Agnes.